


**Buffét**
*ÚTSETT*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Betong armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, stødlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Skeið í reingerð**
*16. - 17. - 30. nov. og 6. des.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813

# Góðtekur ikki at flokkurin tekur støðu fyri seg

**Gerhard Lognberg er framvegis ikki fyri, at revsilógin verður broytt, soleiðis at tey "kynsligur samleiki" verður skoyttur uppí. - Løgmaður og eg eru als ikki samdir í hesum málinum, sigur Gerhard**

REVSILÓGIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sosialurin hevur ringt til Gerhard Lognberg og spurt um hansara viðmerkingar, nú Jóannes Eidesgaard, løgmaður og formaður í Javnaðarflokkinum, hevur skrivað eitt lesarabræv, har ið hann veitir sín stuðul til tey samkyndu. Hann eftirlýsir, at tey samkyndu verða vard í revsilógini, soleiðis at tað ikki verður loyvt at happa, hótta ella niðurgera fólk orsakað av teirra kynsliga samleika.



*- Tey eru vard av harðskapslógini eins og øll onnur. Tað er ikki loyvi at leypa á fólk, og um onkur ger tað, so skal løgreglan taka viðkomandi, sigur Gerhard Lognberg um tey samkyndu*

### Hevur somu støðu

- Ja, eg havi lisið lesarabrævið hjá løgmanni. Men eg havi somu støðu. Eg haldi ikki, at tað er neyðugt, at ein serstakur bólkur verður vardur framum onnur, heldur Gerhard Lognberg.

Hann harmast tó hendingarnar í seinastuni, tá ið samkynd eru vorðin útsett fyri harðskapi.

- Summi fáa tað at ljóða, sum at eg eri fyri, at fólk verða forfylgd. Tað eri eg als ikki. Fólk eiga ikki at verða forfylgd, og tá ið onkur fremur harðskap á ein annan, so skal brotsmaðurin revsast fyri tað.

Gerhard er greiður í síni støðu, og hann er ikki at vika, hóast nógvir av hansara floksmonnum ikki hava somu støðu sum hann.

- Løgmaður má sjálvur um tað, sum hann hevur skrivað. Vit báðir eru als ikki samdir í hesum málinum, og tað hava vit ongantíð verið. Hetta má vera nakað, sum hvør persónur sjálvur skal taka støðu til. Eg fari ongantíð at góðtaka, at flokkurin tekur støðu fyri meg, slær Gerhard fast.

### Ikki tørvur á lóg

Gerhard heldur tó, at tey samkyndu skulu verjast móti harðskapi eins og øll onnur fólk. Hann undrast á úttalilsi frá løgreglumanni um, at teir ikki kunnu verja tey samkyndu.

- Tey eru vard av harðskapslógini eins og øll onnur. Tað er ikki loyvi at leypa á fólk, og um onkur ger tað, so skal løgreglan taka viðkomandi.

Gerhard roknar ikki við, at motivið er at fáa tey samkyndu vard.

- Motivið er at gera hatta natturligt. Tey royna at lirka teirra sak spakuliga í gjøgnum bakdyrnar.

# Henrik Old ongar viðmerkingar í heystfrítíðini



*Henrik Old vil ikki gera viðmerkingar til lesarabrævið hjá løgmanni, tí at hann er í heystfrítíð, og hann hevur annað at gera. Hann hevur als ikki lisið lesarabrævið hjá løgmanni*

REVSILÓGIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Sosialurin setti seg í samband við Henrik Old fyri at fáa hann at gera viðmerkingar til lesarabrævið hjá løgmanni, men hann hevði einans fylgjandi at svara:

*Góðan dagin. Hetta er frá Sosialinum.*

Okey!

*Eg ringi í samband við lesarabrævið hjá løgmanni...*

So hevur tú fingið skeivt nummar. Hetta er Henrik Old. Tú skalt hava fatur í løgmanni!!

*Eg ætlaði einans at fáa teg at gera viðmerkingar til lesarabrævið hjá løgmanni.*

Nei, eg eri í heystferiu, og eg havi onnur ting at gera. Eg havi als ikki lisið lesarabrævið hjá løgmanni.

*Men um eg nú endurgevi okkurt úr lesarabrævinum. Kanst tú gera viðmerkingar til tað, ella hevur tú ongar viðmerkingar til almenningin í heystfrítíðini?*

Nei, tað vil eg ikki. Eg havi onnur ting at gera. (samtalan liðug)